UTTAN ÚR HEIMI

## Hóttir við at fara frá

Forsetin í Suðurkorea, Roh Moo-hyun, hevur gjørt av at halda fólkaatkvøðu tann 15. desember. Tá skal fólkið siga, um tey eru nøgd við forsetan. Eru tey ikki tað, fer hann frá.

Seinastu tíðina er forsetin lagdur undir at hava fingið ólógligan fíggjarligan stuðul til sítt politiska virksemi. Hann hevur víst skuldsetingunum aftur og sigur, at soleiðis sum viðurskiftini eru, kann hann ikki halda fram í forsetaembætinum. Tí vil hann hava at vita, um veljararnir framvegis hava álit á honum.

Tann 57 ára gamli Roh varð valdur til forseta í Suðurkorea í desember í fjør, og hann hevur havt nógvar trupulleikar at stríðast við síðani. Viðurskiftini við grannalandið Norðurkorea eru spent, búskaparviðurskiftini eru versnað munandi seinastu mánaðarnar, og eitt uppskot um at lata USA senda fleiri hermenn til landið hevur elvt til stór mótmæli.

## 3,5 mió. komnar í grunnin

Beint eftir at svenski uttanríkisráðharrin, Anna Lindh, varð myrd, stvonaðu sosialdemokratiski flokkur hennara ein minnisgrunn í hennara navni.

Endamálið hjá grunninum er at stuðla teimum, sum eru sinnað at virka fyri teimum politisku hugsjónunum, sum Anna Lindh stríddist fyri. Talan er í fyrsta lagi at virka øllum harðskapi og at stuðla teimum, sum arbeiða fyri demokratii og mannarættindum kring heimin.

Grunnurin hevur fingið góða undirtøku, og higartil hava fólk og stovnar goldið umleið hálva fjórðu milliónir krónur í grunnin.

## Ikki turriklæði í skúlanum

Muslimarnir í Fraklandi eru í øðini, eftir at leiðslan á einum skúla í Aubervillers uttan fyri París hevur gjørt av at vísa tveimum muslimskum systrum av skúlanum, tí tær sýttu fyri at taka turriklæðið av høvdinum, tá teir komu í skúla.

Mamma genturnar er ættað úr Algeria og er muslimur, men pápin er jødi, men sigur seg ikki hoyra til nakað ávíst trúarsamfelag. Hann er í øðini inn á avgerðina hjá skúlaleiðsluni og sigur, at hann ætlar sær at leggja málið fyri dómstólarnar. Nógvir fransmenn ivast eisini í avgerðini hjá skúlaleiðsluni. Í grundgevingunum sigur skúlin, at hann hevur tikið avgerðina út frá einari niðurstøðu, sum tann serliga franska grundlógarnevndin gjørdi í 1989. Nevndin gjørdi av, at "mótmælandi" og "trúboðandi" eyðkenni eru ikki loyvd í fronskum sjúlum. Men nógvir fransmenn spyrja, hvussu er vorðið við teimum, sum hava ein kross ella eina dávidsstjørnu hangandi í einari ketu um hálsin.

Hesin spurningurin fær eisini politiska viðgerð. Ein nevnd hjá tjóðartinginum og ein nevnd, sum Chirac, forseti, hevur sett, fara at kunngera sínar niðurstøður innan ársskiftið.

## Tað kann Ísrael ikki

Ísraelskir og aðrir vápnaserfrøðingar avsanna, at Ísrael hevur kavbátar, sum kunnu skjóta kjarnorkuløddar rakettir.

Tað var amerikanska blaðið Los Angeles Times, sum bar tíðindini um, at Ísrael hevur broytt sínar amerikonsku rakettir av slagnum Harpoon, so teir kunnu løða tær við kjarnorkuvápnum og skjóta tær upp frá kavbátum. Blaðið segði seg hava fingið tíðindini frá amerikonskum embætismonnum, og ein ísraelskur embætismaður váttaði tey eisini fyri blaðnum. Men serfrøðingar halda ikki, at tíðindini eru sonn. Teir siga, at Harpoon-rakettirnar eru ov smáar til at bera eina kjarnorkuløðing.

Ísrael hevur ongantíð viljað vátta, at landið hevur kjarnorkuvápn, men síðani 1969 hevur tað verið tann vanliga uppfatanin, at landið hevur kjarnorkuvápn. Serfrøðingar halda, at ísraelska verjan hevur einar 200 kjarnorkuløðingar.

# 1500 vorðin heimleys eftir ísraelskt álop



*Umleið 1500 fólk gjørdust heimleys í ísraelska álopinum á Rafah*

**Palestinska flóttafólkalegan Rafah líktist mest einum jarðskjálvtaøki, eftir at ísraelskt stríðsvognaálop.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Leygardagin skutu einir 40 ísraelskir stríðsvognar eftir íbúðarhúsum í palestinsku flóttafólkaleguni Rafah sunnan fyri Gaza-geiran. Tá stríðsvognarnir tóku seg aftur, høvdu teir oyðilagt 120 hús, og umleið 1500 fólk vóru vorðin heimleys, sigur ST.

Ein talsmaður hjá ST, sum var í Rafah sunnudagin, segði við BBC, at økið líktist mest einum jarðskjálvtaøki.

Ísraelska herleiðslan sigur, at endamálið við álopinum var at oyðileggja nakrar tunlar ímillum egyptiskt øki og Gaza-geiran, sum sambært ísraelsmonnum verða nýttir til vápnaflutning. Ísraelska útvarpið segði í gjár, at herurin hevur funnið tunlarnar, men eingi vápn.

Palestinsku myndugleikarnir siga, at átta fólk, teirra millum tveir dreingir, doyðu í ísraelska álopinum, og at umleið 50 vórðu særd.

ST hevur fordømt ísraelska álopið. Kofi Annan, aðalskrivari, segði í gjár, at ísraelska framferðin at leypa so ógvusliga á eitt íbúðarøki er í stríð við altjóða lóg. Men hetta er ikki fyrstu ferð, at vit noyðast at minna Ísrael á hetta, legði aðalskrivarin afturat.

# Krevja 6500 milliardir frá bin Laden

**Amerikanarar krevja nú hálva sjeyndu milliard krónur í endurgjaldi fyri yvirgangsatsóknina 11. september í 2001.**

ENDURGJALD
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tveir amerikanskir sakførarar eru farnir undir eitt endurgjaldsmál, sum má sigast at vera eitt av teimum sera sjáldsomu.

Joe Rice og Ron Motley hava átikið sær at krevja 6.500 milliardir krónur í endurgjaldi við yvirgangsfelagsskapinum fyri atsóknirnar í New York og Washington fyri góðum tveimum árum síðani. Sakførararnir viðganga, at tað er ógjørligt at leggja sak ímóti felagsskapinum hjá Osama bin laden, og tí ætla teir at krevja pengarnar frá teimum, sum hava ella hava havt samband við bin Laden. Talan er um saudiarabiskar prinsar og bankar.

Teir báðir sakførararnir eru kendir og hava vunnið fleiri endurgjaldsmál. Eitt nú eydnaðist teimum fyri fimm árum síðani at fáa semju við amerikanska tubbaksídnaðin - eitt mál, sum gav teimum stevnandi heilar 246 milliardir dollarar. Teir hava eisini fingið semju í einum máli ímóti amerikanska asbestídnaðinum, og har eydnaðist teimum eisini at fáa ídnaðin at rinda nógvar milliardir krónur.

Eygleiðarar ivast í, hvat teir báðir fara at fáa burtur úr at krevja endurgjald fyri atsóknirnar í USA, men teir halda, at málið kann gera tað turplari hjá bin Laden at útvega pengar til sítt virksemi.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341820 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Mourits Joensen 100 ár

Í dag, týsdagin 14. oktober, fyllir Mourits Joensen í Havn 100 ár. Mourits er ættaður úr Hvalvík. Foreldrini vóru, Katrina, f. Hansen, úr Hvalvík, og Petur Joensen, av Oyri, vanliga nevndur Petur á Oyri.

Mourits hevur verið sjómaður og arbeiðsmaður, hann arbeiddi t.d. hjá norðmonnunum á hvalastøðini við Áir.

Hann giftist við Claru, sum var ættað úr Kvívík, tey fluttu til Havnar at búgva í 50-unum.

Í Havnini arbeiddi hann hjá Petur Michelsen, byggimeistara, á Bacalao og sum lossingarmaður.



*Í dag verður Mourits Joensen í Havn, ættaður úr Hvalvík, 100 ár*
*Mynd: Maria Olsen*

Clara og Mourits vóru virkin í Meinigheitshúsinum í Havn, og komu tey har so leingi, tey orkaðu.

Clara doyði í 1998, tá hevði hon búð á Lágargarði í eini tíggju ár. Fyri hálvumtriðja árið síðan flutti Mourits á Lágargarð.

Opið hús verður á Lágargarði í dag frá kl 15-18, har høvi verður at hitta Mourits.

## Ditleif Eldevig 75 ár

Sunnudagin 12. oktober fylti Ditleif Eldevig í Fuglafirði 75 ár. Ditleif er fuglfirðingur, hann er elstur av teimum átta børnunum hjá Andreu, f. Danielsen, og Chr. Sofus Eldevig í Fuglafirði.

Mamman, Andrea, var úr Havn, dóttir Hornabóndan, Jóhan Danielsen. Hon vaks upp við Gjógv og flutti seinni til Fuglafjarðar at búgva. Pápin, Chr. Sofus, var sonur Onnu og Albert, á Trøðni í Fuglafirði.



Ditleif lærdi til maskinsmið hjá S.P. Petersen í Fuglafirði og gekk seinni á maskinskúla í Havn. Hann passaði í nøkur ár elverkið í Fuglafirði, áðrenn SEV kom, og arbeiddi hann eisini aftur í smiðjuni hjá S.P. Petersen. Eina tíð hevði hann handil, har hann seldi og umvældi radio og aðrar el-lutir.

Ditleif var ein av stigtakarunum og stovnarunum av fiskavirkinum Havsbrún í Fuglafirði, ið byrjaði at taka ímóti fiski í 1966. Hann var stjóri á Havsbrún frá byrjan til fyrst í 90-unum, tá hann var við til at seta gongd á Fiskamarknaða Føroya á Toftum, har hann var stjóri til seinnu helvt av 90-unum. Bæði Havsbrún og Fiskamarknaðurin eru tveir varðar í føroysku fiskivinnuni.

Ditleif var í mong ár bygdaráðsformaður í Fuglafirði. Hann var við til at stovna Føroya Kommunufelag og varð fyrsti formaðurin í felagsskapinum. Hann hevur verið stýrislimur í SEV og sat í stýrinum fyri Føroya Handilsskúla í mong ár. Seinnu árini hevur hann verið virkin innan eldrafelagið Borgina í Fuglafirði, har hann trívist sera væl.

Í 1952 giftist Ditleif við Rosu, f. Øregaard, dóttir Elisabeth, f. Hansen, ættað úr Funningi, og Poul Øregaard úr Fuglafirði, sum búðu á Lakjuni í Fuglafirði.

Rosa og Ditleif eiga seks børn, tey eru: Mariann, sum býr í Havn, Elisabeth, sum býr í Fuglafirði, Kristian og Pól, sum búgva í Danmark, og Anna og Rita, sum búgva í Hoyvík.

## Dagurin

14. oktober. Kalixtus, deyður í umleið ár 222. Trælur, sum gjørdist diakonur hjá pávanum og fekk um hendur at standa fyri jarðarferðum teirra kristnu. Summar av katakombunum bera navn hansara.

*Veturnætur*, vetrarhálvár byrjar.

Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:............................................................
Bústaður:.......................................................
Bygd/býur:..............................Tel:......................
Evt. arbeiðspláss:..........................................

Merkisdagurin er: ...........................................

Innsendari: ..................................Tel:...................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo